LØGMANSSKRIVSTOVAN

THE PRIME MINISTER'S OFFICE



# Ársfrágreiðing 2012

*Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp*

Formæli ........................................................................................................ 2
Føroyar í menningarstarvshøpi ........................................................................................................ 3
Lógargrundarlag ........................................................................................................ 3
Raðfestingar ........................................................................................................ 3
Fyrisiting ........................................................................................................ 4
Menningarsamstarv Føroya í 2012 ........................................................................................................ 5
Samstarvslond ........................................................................................................ 6
Um verkætlanirnar ........................................................................................................ 6
Pakistan - sjúkrahúsverkætlan ........................................................................................................ 7
Eysturtimor – fiskivinnuverkætlan ........................................................................................................ 9
Kambodja - fiskivinnuverkætlan ........................................................................................................ 9
Nepal - undirvísingarverkætlan ........................................................................................................ 11
Kenja – skúlabygging ........................................................................................................ 11
Sambia – vatn og heilsuverkætlan ........................................................................................................ 14
Senegal - undirvísingarverkætlan ........................................................................................................ 15
Eftirlitsferð til Kambodia ........................................................................................................ 14
Virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv ........................................................................................................ 22
Um samstarvspartarnar ........................................................................................................ 23
Fíggjarnýtsla 2012 ........................................................................................................ 25
Listi yvir menningarlond sambært OECD ........................................................................................................ 26

# Formæli

“Gev einum manni ein fisk, og hann verður mettur fyri ein dag. Lær hann at fiska, og hann verður mettur fyri lívið.” Flestu okkara kenna hetta gamla orðatakið, sum í fluttari merking kann nýtast um flestøll lívsins viðurskifti. Tá tað umræður menningarsamstarv er hesin hugsunarháttur grundleggjandi.

Aðalendamálið við føroyskum menningarsamstarvi er at bøta um livistøðið í teimum samfeløgum, vit samstarva við. Tað er avgerandi at móttakandi samstarvsparturin kennir ognarskap í verkætlanini, og at samstarvið veitir fólki stuðul til at gerast før fyri at bøta um egin lívskor.

Í fjør lótu Føroyar stuðul til sjey verkætlanir í Asia og Afrika. Nakrar av verkætlanunum eru framhald av verkætlanum, ið fingu stuðul í 2001, meðan aðrar fóru av bakkastokki í fjør. Tvær av verkætlanunum snúgva seg ítøkiliga um at læra fólk at fiska, hagreiða og selja fiskin. Á henda hátt fáa familjur breyðføtt sær, samstundis sum arbeitt verður framímóti at fáa úrtøku burturúr fiskarínum. Hinar verkætlanirnar snúgva seg um heilsu og útbúgving, ið er ein fortreyt fyri at læra og mennast.

Tað er sera hugaligt at fylgja gongdini. Onkutíð gongur seinni enn ætlað – ella øðrvísi enn ætlað, tí at móttakandi parturin vísir á aðrar møguleikar. Royndirnar vísa tó, at tað er avgerandi fyri eina væleydnaða og burðardygga verkætlan, at tey, ið verkætlanin snýr seg um, eru virkin í verkætlanini. Frá planlegging til útinnan. Á henda hátt er talan um veruligt samstarv.

Hóast okkara ískoyti ikki er stórt í altjóða høpi, eri eg sannførdur um, at okkara partur munar fyri tey menniskju, ið fáa ágóðan av teimum verkætlanum, sum fáa stuðul úr Føroyum. Eg haldi tí, at vit eiga at seta okkum sum mál at økja játtanina til altjóða menningarsamstarv, fyri at gera enn størri mun úti í heimi.

Í Tinganesi, 11. juni 2013

Kaj Leo Holm Johannesen
løgmaður

## Føroyar í menningarsamstarvshøpi

Føroyar hava latið menningarhjálp síðani fyrst í nítiárunum. Í 2004 varð lóggáva gjørd á økinum, og játtanin varð hækkað. Lógin var dagførd í 2007, og virkað verður eftir hesari løgtingslóg. Seinastu árini hevur játtanin verið 2 milliónir krónur um árið. Harumframt er serstøk játtan til neyðhjálp, sum í 2012 var 500.000 krónur.

Føroyar lótu menningarstuðul til sjey verkætlanir í hesum londumí 2012: Nepal, Kambodia, Pakistan, Kenja, Sambia, Senegal og Eysturtimor. Stuðulin til verkætlanirnar í Nepal og Kambodia var framhald av stuðli, ið var latin í 2011. Verkætlanirnar snúgva seg um heilsu og útbúgving og at menna fiskivinnumøguleikar.

Menningarsamstarvið verður í høvuðsheitum framt í samstarvi við NGO[1] hjálparfelagsskapir, bæði føroyskar og útlendskar. Samstarvað verður eisini við stjórnarfelagsskapir, t.d. heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu tjóðum, World Food Programme (WFP) og Heimsbankan.

## Lógargrundarlag

Virkað verður eftir løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv. Sambært løgtingslógini er høvuðsendamálið við altjóða menningarsamstarvi at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum gjøgnum burðardygt menningarsamstarv. Umframt at virka fyri hesum máli, hevur landsstýrið sett sær fyri at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum.

## Raðfestingar

Menningarsamstarv verður umsitið á Uttanríkistænastuni á Løgmansskrivstovuni. Støðið verður tikið í framtíðar menningarmálunum hjá ST *Millenium Development Goals*, og útbúgving og heilsa verða raðfest fremst í menningarsamstarvi. Hetta er grundað á, at útgangsstøðið fyri menningarsamstarvinum er sjálvberandi menning, og tá er útbúgving grundarlagið. Góð heilsa er ein treyt fyri at kunna læra, tí hanga útbúgving og heilsa óloysiliga saman. Fiskivinnuverkætlanir verða somuleiðis raðfestar, tí her

[1] NGO er stytting fyri non-governmental organization - ikkistjórnarligir felagsskapir.

hava vit serstaka vitan og førleikar at lata. Dentur verður harumframt lagdur á at skapa møguleikar fyri virknari føroyskari luttøku. Hetta verður serliga gjørt við at knýta føroyskar felagsskapir og føroyska serfrøði at verkætlanum.

## Fyrisiting

Tað eru alt fleiri felagsskapir, bæði føroyskir og útlendskir, sum venda sær til Uttanríkistænastuna við umsóknum til verkætlanir. Í 2012 fekk Uttanríkistænastan 17 formligar umsóknir, umframt fleiri áheitanir um samstarv. Stórur partur av umsóknunum vórðu mettar at vera stuðulsverdar, men við støði í játtanini á Fíggjarlógini var bert gjørligt at lata sjey verkætlanum stuðul.

Í kunngerð nr. 72 frá 25. juni 2008 um altjóða menningarsamstarv eru neyvar treytir og reglur fyri, hvør ið kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðul verður játtaður. Her eru at nevna krøv til fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og afturrindan av stuðli.

Umsøkjarar nýta umsóknarblað, sum tekur støði í formligu krøvunum til stuðul. Nýtt umsóknarblað og vegleiðing, á bæði enskum og føroyskum, varð tikið í brúk við ársbyrjan 2012. Í tilfarinum er neyv lýsing av, hvat krevst fyri at fáa stuðul til menningarverkætlanir, samstundis sum tað verður greitt frá, hvat umsóknin skal fevna um. Umsóknarblaðið skal sendast til Uttanríkistænastuna talgilt ella í pappírsútgávu. Gjølligari verkætlanarlýsing og møgulig onnur skjøl skulu sendast talgild. Umsóknarfreistin er tvær til fýra ferðir árliga. Lýst verður við tíðarfreistunum á www.tinganes.fo[2].

Málsviðgerðin verður fyrireikað í Uttanríkistænastuni. Umsóknirnar verða síðani lagdar fyri ráðgevandi nevndina fyri altjóða menningarsamstarv til ummælis. Til ber at lesa meira um ráðgevandi nevndina á s.22.

## Eftirlit

Eftirlitið verður framt við frágreiðingum, roknskapi ella grannskoðaðum roknskapi samsvarandi ásetingunum í kunngerðini um altjóða menningarsamstarv. Allir stuðulsmóttakarar undirrita eitt

[2] Í 2013 er avgjørt at áseta tvær fastar tíðarfreistir, ið skulu vera galdandi frameftir. Fyrra freistin er 1. mai, og seinna freistin er 1. okt.

avtaluskjal, eina sokallaða *Grant Agreement*, har neyvar ásetingar fyri upplýsingarskyldu eru ásettir. Í avtaluni millum Uttanríkistænastuna og móttakaran er somuleiðis ásett, at myndugleikin tilskilar sær rætt at gera eftirlit á staðnum, tá ið tað verður mett neyðugt og/ella hóskandi.

Við avmarkaðari fíggjarligari orku er neyðugt at raðfesta gjølla, hvagar og hvussu ofta farið verður á eftirlitsferð[3]. Í 2012 varð avgjørt at fara á eftirlitsferð til Kambodia í sambandi við, at Føroyar stuðlaði tveimum verkætlanum í landinum. Frágreiðing frá ferðini er á s. 18. Seinasta eftirlitsferð undan hesari var í 2009, tá vitjað varð í Liberia.

## Menningarsamstarv Føroya í 2012

Í 2012 var játtanin til menningarsamstarv 2 milliónir krónur. Allur stuðulin hetta árið varð latin umvegis NGO felagsskapir. Sum sæst á myndini niðanfyri, so var stórur partur av játtanini nýttur til undirvísingarverkætlanir, harnæst heilsuverkætlanir og annars fiskivinnuverkætlanir. Nakrar av verkætlanunum eru framhald av verkætlanum, ið fingu stuðul í 2011, meðan aðrar fóru av bakkastokki í 2012.




[3] Útreiðslur í sambandi við eftirlitsferðir o.a. fer ikki av játtanini til menningarsamstarv. Hendan játtan verður bert nýtt til verkætlanir.

## Samstarvslond

Stuðul verður bert latin londum, ið OECD[4] skilmarkar sum menningarlond. OECD ger regluligar bólkingar av, hvørji lond kunnu skilmarkast sum menningarlond, mett eftir BTÚ fyri hvønn íbúgva. Flestøll ídnaðarlond ganga eftir hesi bólking.

OECD lutar menningarlond í fýra bólkar: 1) Minst mentu londini (Least developed countries), 2) onnur láginntøku lond (Other low income countries), 3) lægri miðalinntøku lond og umveldi (Lower middle income countries and territories), og 4) hægri miðalinntøku lond og umveldi (Upper middle income countries and territories). Ásetingarnar fevna um allar fýra bólkar. Verkætlanir í bólki 1 og 2 verða raðfestar fremri enn í bólki 3 og 4, um tær annars uppfylla krøvini og verða mettar stuðulsverdar. Eitt yvirlit yvir bólkarnar er s. 26.

Sum sæst á myndini omanfyri, varð stuðulin latin til verkætlanir í Nepal, Kambodja, Eysturtimor, Kenja, Senegal, Sambia og Pakistan. Nepal, Kambodja, Eysturtimor, Kenja, Senegal og Sambia verða bólkað í bólki 1 (minst mentu londini). Kenja í bólki 2 (onnur láginntøku lond), meðan Pakistan verður bólkað í bólki 3 (lægri miðalinntøku lond og umveldi).

## Um verkætlanirnar

## Pakistan - sjúkrahúsverkætlan

Uttanríkistænastan lat Landssjúkrahúsinum 125.000 kr. í 2012 til at flyta ein skannara til Pakistan. Landssjúkrahúsið fekk ein nýggjan CT-skannara í 2012, og ynskti at lata gamla skannaran til vælgerandi endamál. Skannarin varð latin til eina barnasjúkrahús-verkætlan í Pakistan, ið danski-pakistanski barnalæknin, Sajida Afzal, stendur fyri saman við Dagens Medicin.

Barnasjúkrahúsið skal veita fátøkum børnum ókeypis ortopediskar viðgerðir. Mett verður, at til ber at hjálpa umleið 4000 børnum árliga fyri m.a. klumpfót.

---

[4] OECD er stytting fyri Organisation for Economic Cooperation and Development.

Almennu heilsutænasturnar eru avmarkaðar í Pakistan. Størsti parturin av sjúkrahúsunum eru privat, og sjúklingar skulu gjalda fyri viðgerð. Á ortopediska økinum eru bert 400 serlæknar til 165 milliónir íbúgvar. Eingin barnaortopedur er. Hetta ger, at møguleikarnir hjá børnum, ið bera kropslig brek, eru sera avmarkaðir. Børn úr fátøkum familjum, ið bera brek, enda tí mangan sum kryplingar, ið ongan annan møguleika hava enn at bidda á gøtuni.

Skannarin fór úr Føroyum í november mánaði og kom fram í síðst í januar 2013. Sjúkrahúsið varð tikið í brúk í mai 2013, men enn vanta nøkur endalig loyvi at seta skannara upp á sjúkrahúsinum. Tá hesi eru fingin til vega, verður skannarin tikin í brúk alt fyri eitt.



Læknin Sajida Afzal við einum av sínum fyrstu sjúklingum – ein lítil genta, ið hevur klumpfót.

# Eysturtimor - fiskivinnuverkætlan

Felagsskapurin Mercy Corps fekk í fjør 180.500,00 kr. til eina fiskivinnuverkætlan í Eysturtimor. Verkætlanin byggir á tiltøkini í "Fishing for Change" verkætlanini,  ið Uttanríkistænastan stuðlaði í 2010/2011, og hevur til endamáls at økja matvørutrygdina úti við strendurnar og inni í landinum í Eysturtimor.

Eysturtimor er eitt av fátækastu og minst mentu londunum í heiminum. Árini við bardøgum og kúgan hava sett djúp spor og lagt bæði vegir, brúgvar og bygningsverk í oyði. Fiskivinnuútgerð sum bátar, gørn og línur varð eisini oyðilagt. Hetta hevur havt við sær, at húsarhaldini ikki hava fingist við fiskivinnu tey seinastu árini. Fólk liva í høvuðsheitum av landbúnaði, men úrtøkan er ikki høg. Føðslutrot er ein av høvuðstrupulleikunum í landinum, og umleið 65 prosent av íbúgvunum fáa ikki nøktandi føði. Bert nakrar fáar hundrað familjur liva av fiskivinnu, hóast tilfeingið í havinum er ríkt. Høvuðsorsøkin til hetta er, at fólk hvørki hava neyðugu útgerðina ella vitan og royndir. Við at menna fiskivinnuna í  Eysturtimor ber til at bøta munandi um kostin og inntøkumøguleikarnar. Umframt fiskivinnumenning fram við strendurnar arbeiðir Mercy Corps við at menna fiskiveiði á vøtnum, t.d. við at ala vatnfisk og rækjur í smáum hyljum ella á rísakrunum.

Átakið, ið Føroyar stuðla, er partur av einari størri verkætlan. Átakið byggir á góðu royndirnar frá “Fishing for Change” verkætlanini, og snýr seg um at víðka um fiskaalingina við grønmetisdyrkan. 120 Tilapia[5] alarar skulu upplærast í hesum, og skulu síðani sjálvir læra frá sær.







[5] Tilapia er ein feskvatnsfiskur, ið veksur skjótt og er lættur at ala.

# Kambodja – fiskivinnuverkætlan

Uttanríkistænastan lat 132.872,00 kr. til eina eitt ára fiskivinnuverkætlan í Kambodja, ið felagsskapurin Voluntary Services Overseas (VSO) stendur fyri. Samlaða upphæddin úr Føroyum var góðar 600.000 kr., og var hetta seinna útgjaldið.

Endamálið við verkætlanini er at økja um inntøkumøguleikarnar í økjunum kring Tonle Sap ánna í útnyrðingspartinum av Kambodja og Mekong ánna í  landnyrðingspartinum av landinum.

Kambodja er eitt av fátækastu londunum í Suðurasia. Árini við kríggi og kúgan hava havt við sær økt fátækdømi, ójavna millum teir ymsu samfelagsbólkarnar og eina skipan fongda við mutri. Áleið 35 prosent av íbúgvunum í landinum liva undir fátækramarkinum, og livialdurin er millum teir lægstu har um leiðir. Pinkubarnadeyðin er høgur, og stórur partur av børnunum í landinum fáa ikki nøktandi føðsluevni. Støðan er serliga trupul úti í bygdunum.

Fiskiskapur hevur stóran týdning. Inntøkan hjá yvir 60 prosent av íbúgvunum í landinum er beinleiðis ella óbeinleiðis tengd at fiskiskapi, og 80 prosent av protein- inntakinum hjá fólkinum kemur frá fiski. Fiskiskapurin er hóttur nógvastaðni orsakað av ovfisking, vantandi ásetingum og vantandi stýring. Hesi viðurskifti hava økt fátækdømi í teimum økjunum, har fólk í høvuðsheitum liva av fiskiskapi.

Stjórnin í Kambodja hevur sett tiltøk í verk fyri at bøta um støðuna og sum liður í hesum vóru fiskirættindi løgd út til lokalsamfeløgini at umsita í 2001. Ein fortreyt fyri at hetta skal hepnast er samstarv, bæði millum lokalar og sentralar myndugleikar, og eisini á lokalum stigi  – t.e. millum ymsu brúkarnar av økjunum. Verkætlanin hjá VSO hevur til endamáls at stuðla uppundir samstarvið og at menna og sameina lokal og national tiltøk.

Higartil hava 593 limir í lokalum fiskarísamtøkum fingið frálæru í hvussu smá virki verða ment og hvussu framleiðslan kann mennast. 120 familjur eru upplærdar í tilgerð av fiski og góðsking.

Tað serliga við VSO er, at felagsskapurin nýtir “professional volunteers” - fólk, ið hava serligan førleika og royndir innan ávís øki, t.d. innan planlegging, marknaðarføring, undirvísing o.s.fr. Hesi

arbeiða fyri eina lítla samsýning[6] í eitt tíðarskeið í lokalum felagsskapum, skúlum, stovnum ella landsfyrisitingini. Til ber eisini hjá føroyingum at søkja um at arbeiða sum sjálvboðin fyri VSO - antin við at venda sær til Uttanríkistænastuna ella gjøgnum www.vsointernational.org/volunteer.

Í sambandi við fiskivinnuverkætlanina hevur VSO samstarva við fýra lokalar felagsskapir og landsins fiskivinnuumsiting. VSO sjálvboðin hava arbeitt í lokalum felagsskapum, sum virka í Kratie og Stung Treng og í Battambang landslutinum. Høvuðsuppgávan hevur verið at ment førleikar í felagsskapunum, so at felagsskapirnir eru vorðnir førir fyri at upplæra fólk á staðnum innan planlegging, menning av smáum virkjum, marknaðarkanningar og harumframt menning av tekniskum førleikar ísv høsnahald og fiskaaling. Harumframt hevur VSO eitt fólk í fiskivinnuumsitingini, ið hevur arbeitt við at menna langtíðar ráðleggingar bygnaðin. Viðkomandi hevur m.a. hjálpt til við at gera eina strategiska ætlan fyri fiskivinnuøkið komandi 10 árini, og at seta tiltøkini í verk. Skipanin við at hava fólk bæði á stjórnarstigi og á grasrótstigi skal tryggja, at samanhangur er millum ráðlegging og íverksetan úti í lokalsamfeløgunum. Verkætlanin byrjaði í januar 2012 og endar í mars 2013.



Á myndini sæst ein bátur, ið er keyptur fyri ein part av stuðlinum úr Føroyum. Báturin verður nýttur sum vaktarbátur, at fyribyrgja ólógligum fiskarii í økinum og til at flyta fisk til sølumarknaðin. Báturin ber áskriftina “Faroe Islands”.

---

[6] Samsýningin fevnir um útreiðslur í sambandi við bústað, ferðing, trygging o.l. Harumframt verður ein mánaðarlig upphædd latin til mat, klæðir og aðrar grundleggjandi útreiðslur.

# Nepal – undirvísingarverkætlan

264.004,00 kr. vórðu latnar í stuðli til eina undirvísingarverkætlan í Nepal í 2012. Talan er um eina fýra ára verkætlan, har ið Føroyar hava latið stuðul til 3. árið. Stuðulin er latin í tveimum umførum – fyrra útgjaldið varð latið í 2010. Verkætlanin hevur til endamáls at veita 15.000 illa støddum børnum úr fátækøkjum í Kaski, Rupandehi og Kailali grundleggjandi og nøktandi skúlagongd. Høvuðsstuðul er ES Nevndin (European Commission).

Fráfallið í barnaskúlanum er stórt í Nepal og góðskan í undirvísingini er ivasom nógvastaðni. Útsettir bólkar sum Dalit børn[7], børn, ið bera brek og gentur hava lægri luttøku í skúlaskipanini og verri avrik. Tað eru fleiri orsøkir til tess, m.a. vánalig atkoma, mismunur og fátækdømi.

Verkætlanin tekur støði í nýskipanini hjá stjórnini *School Sector Reform* (SSRP) og skal tryggja at illa staddir samfelagsbólkar – gentur,  Dalit og børn, ið bera brek - verða innskrivað í skúla, luttaka í undirvísingini og gjøgnumføra barnaskúla. Arbeitt verður tætt saman við NGO felagsskapum á staðnum, lokalu myndugleikunum og Undirvísingarmálaráðnum.



[7] Dalit er ein lág samfelagsstætt (kasta) í Nepal. Fólk, ið hoyra til hesa samfelagsstætt eru fyri mismuni í samfelagnum og verða t.d. noktað atgongd til matstøð, tempul og onnur almenn støð. Hóast tað sambært lóg í Nepal er bannað at fremja mismun móti fólki, ið hoyra til Dalit stættina, verður ikki stórvegis gjørt fyri at steðga hesum. Sambært mannarættinda-felagsskapum misrøkir stjórnin sína skyldu at veita stættini grundleggjandi politisk, fíggjarlig og mentunarlig rættindi.

Verkætlanin fevnir um eina røð av tiltøkum, ið skulu viðvirka til, at børnini koma í skúla, og at tey ikki eru fyri mismuni í skúlaskipanini. Hetta verður m.a. gjørt við átøkum, ið hava til endamáls at innskriva børnini í skúla, at kanna hví børn ikki vera send í skúla, at menna nýggjar skipanir, ið tryggja at øll børn verða innskrivað og gjøgnumføra skúlagongdina, at stovna serflokkar til børn, ið eru fráfallin/afturúr, at førleikamenna lærarar og leiðsluna, at arbeiða við myndugleikunum, og skapa tilvitan um barnarættindi og at basa mismuni.

VSO hevur samstarvað við Undirvísingarmálaráðið um at fremja tiltøkini í SSRP. Tríggir landslutir vóru við í verkætlanini fyrsta og næsta árið. Men eftir áheitan frá stjórnini var verkætlanin víðkað til at fevna um tríggjar aðrar fjarskotnar landslutir í landinum.

Higartil eru:

- Yvir 70 skúlar partar av verkætlanini
- 1541 lærarar og skúlastjórar førleikamentir
- 7000 børn fingin í skúla aftur (við fyrst at fara í serflokkar og síðani í vanligar flokkar)
- Inntøkuskapandi tiltøk sett í verk, so at foreldur ikki eru so bundin av inntøku frá børnunum
- 154 børn, ið hava serligan tørv, sloppin í skúla, tí tey hava fingið hjálp, ið hevur økt um teirra møguleika at ganga í skúla (hjálp til børn við sjóntrupulleikum, hoyritól til deyv, koyristólar og høkjur til lamin o.s.fr.).

Eitt stórt framstig er eisini, at stjórnin í Nepal meira og meira tekur ábyrgdina á seg at tryggja umstøðurnar hjá skúlabørnum og virka móti mismuni í skúlaskipanini.

## Kenja - skúlabygging

Uttanríkistænastan lat felagsskapinum New Life Africa International (NLAI) 400.000 kr. í stuðli til skúlabygging í 2012.

NLAI virkar í býnum Nakuru, har felagsskapurin rekur ein skúla og eitt barnaheim. Talan er upprunaliga um eitt privat tiltak, við donsku hjúnunum Susanne og Leif Madsen á odda, ið komu til Kenja sum trúboðarar. Skúlin undirvísir í øllum lærugreinum og fylgir almennu krøvunum um pensum. Børnini ganga í "Primary School" til tey eru 13 – 14 ár, og fara tá upp til eina endaliga roynd, ið allir skúlanæmingar í Kenja skulu standa, fyri at sleppa í miðnám. Bæði kristin og muslimsk børn ganga á skúlanum.



Skúlagongdin fer í dag fram undir primitivum og ótíðarhóskandi umstøðum. Myndugleikarnir hava átalað umstøðurnar, og neyðugt er at byggja ein nýggjan skúla. Fyrireikandi arbeiðið við at fáa allar góðkenningar og loyvir til vega fór í gongd við árslok 2012. Byggingin fer eftir ætlan í gongd í juni 2013.

Mett verður at 2,3 milliónir børn eru foreldraleys í Kenja. Nógv av hesum børnum eiga ongan góðan og halda til á gøtunum. Børnini fáa oftast onga skúlagongd og hava trupult við at fóta sær. Endamálið hjá

NLAI er at fáa børnini av gøtuni og at geva teimum eina grundleggjandi skúlagongd, so at tey hava møguleika at fáa sær eina útbúgving og harvið betri eru før fyri at lívbjarga sær sum vaksin. Børnini læra eisini ymiskt handverk á skúlanum, ið verður selt í lokaløkinum og m.a. í Føroyum.

## Sambia - vatn og heilsuverkætlan

Uttanríkistænastan lat 425.000,00 kr. til eina heilsuverkætlan í Sambia í 2012, ið felagsskapurin Plan UK stendur fyri. Talan er um eina eitt ára verkætlan, ið hevur til endamáls at útvega 25 bygdum í Chadiza landslutinum í eystur Sambia og Mansa landslutinum í norður Sambia reint drekkivatn.



Vatnbrunnar skulu gerast í øllum bygdunum í landslutunum, og bygdafólkini skulu upplærast, so tey í framtíðini sjálvi kunnu standa fyri stýringini og arbeiðinum við vatn og sanitet í bygdunum. Endamálið er at fyribyrgja pinkubarnadeyða og vatnbornar sjúkur.

Sambia er millum fátækastu lond í heiminum. Diarré er saman við malaria og lungnabruna størsta orsøk til høga barnadeyðan í landinum. Støðan er serliga trupul í útjaðaranum, har bert 50 prosent av íbúgvunum hava nøktandi reinførisviðurskifti, og bert 40 prosent hava atgongd til reint vatn.

Verkætlanin byrjaði í september 2012. Fyrstu mánaðirnir hava verið nýttir at planleggja saman við bygdafólkinum, at gera kanningar og at stovna “Village Water, Sanitation and Education (V-WASHE) committees”, ið skulu standa fyri arbeiðinum. Arbeiðið at gera vatnbrunnar og vatnpumpur byrjar í 2013.

## Senegal - undirvísingarverkætlan

Í 2012 vóru 458.000,00 kr. latnar til eina undirvísingarverkætlan í Senegal, sum felagsskapurin Plan UK stendur fyri. Verkætlanin hevur til endamáls at betra um atgongdina til útbúgving og at bøta um dygdina av undirvísingini í Koalack landslutinum. Talan er um eina trý ára verkætlan, ið skal gagna 1300 børnum millum 9-16 ár, harav 900 gentum. Partur av verkætlanini er at førleikamenna lærarar og at stuðla foreldrum at senda teirra børn í skúla.

Yvir 60 prosent av fólkinum í Senegal eru ikki lesifør. Dygdin av undirvísingini er misjøvn, og ofta er fráfallið hjá gentunum høgt. Hetta kemst av, at tær nýta nógv tíð uppá húsligar pliktir og tí ikki hava stundir til skúla og skúlating. Flokkanir eru ovfyltir (ofta 100 næmingar í hvørjum flokki), lærararnir illa útbúnir og fysisku umstøðurnar vánaligar. Við hesari verkætlan er ætlanin at menna 18 skúlar í Koalack landslutinum, sum er ein sera fátækur landspartur. Bøtast skal um flokshølir og latrinur skulu gerast. Gentur, ið eru komnar afturúr, skulu hava møguleika fyri stuðli og eykaundirvísing og lærarar skulu førleikamennast.

Verkætlanin fer í gongd í januar 2013 og heldur fram í trý ár.

## Neyðhjálp

Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp, tá ið vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Hjálpin verður vanliga latin gjøgnum sjálvbodnar hjálparfelagsskapir, sum t.d. Reyða Kross og altjóða stjórnarfelagsskapir, sum t.d. Heimsmatvørufelagsskapin undir Sameindu Tjóðum, World Food Programme (WFP). Játtanin verður eisini nýtt í sambandi við áheitanum frá altjóða myndugleikum um at lata pening til at basa hungursneyð.

Neyðhjálp hevur undanfarin ár verið málsøki hjá Uttanríkistænastuni, men nýggja samgongan gjørdi av at flyta málsøkið í Heilsumálaráðið. Samstundis varð játtanin hækkað úr 300.000 kr. upp í 500.000 kr. Uttanríkistænastan hevur samstarvað við Heilsumálaráðið um umsitingina av játtanini til neyðhjálp. Frá 2013 verður umsitingin av málsøkinum endaliga flutt í Heilsumálaráðið.

Játtanin í 2012 var nýtt til neyðhjálp í Sýria, Saheløkinum í Vesturafrika og á Filipsoyggjunum.

**Stuðul til neyðhjálp í Sýria**

Bardagar millum stjórnarherin og uppreistrarherin í Sýria høvdu ógvusligar fylgir við sær í 2012. Sambært mannarættindafelagskapum vórðu álvarslig mannarættindabrot framd móti borgarum og hópur av fólki flýddu úr býunum, har harðastu samanbrestirnir vóru og noyddust at búseta seg í flóttafólkalegum.

Heilsumálaráðið lat í juni 200.000 krónur umvegis Reyða Kross Føroyar til neyðhjálpararbeiði í Sýria. Sambært Reyða Krossi Føroyar bleiv føroyska neyðhjálpin serliga nýtt til mat, heilsupakkar og teppir til flóttafólkini.

**Stuðul til neyðhjálp í Sahel økinum**

Ógvusligur turkur herjaði í Vesturafrika í 2012. Umleið 7 mió. menniskju vóru rakt av turkinum og mett varð í juni, at áleið eina mió. børn liðu hungursneyð. Altjóða felagsskapir óttaðust, at turkurin í ringasta føri gjørdist eins umfatandi og turkurin í Eysturafrika árið fyri. Við støði í hesum mælti Reyði Krossur Føroyar til, at fyribyrgjandi neyðhjálp varð sett í verk beinanvegin.

Heilsumálaráðið lat í juni umvegis Reyða Krossi Føroyar 100.000 krónur í stuðli til neyðhjálp í Sahel økinum. Sambært Reyða Krossi Føroyar bleiv føroyska neyðhjálpin serliga nýtt til mat til tey mongu hungursraktu.

**Stuðul til neyðhjálpararbeiði á Filipsoyggjunum**

Millum 4. og 7. desember 2012 herjaði tropiska ódnin Bopha Filipsoyggjarnar við ógvusligari megi. Sambært frágreiðing frá WFP tann 11. desember vóru 5,4 mió. fólk rakt av ódnini, fleiri enn 740 mistu lívið og 890 hvurvu í oyðileggingunum. Um 133.000 heim vóru annaðhvørt fullkomiliga oyðiløgd ella illa skadd. Nærum 800.000 fólk máttu húsast á rýmingardeplum ella hjá familju og kenningum.

Tann 13. desember boðaði Heilsumálaráðið Heimsmatvørufelagsskapinum undir ST "World Food Programme" frá, at landsstýrið vildu lata 200.000 kr. til bráðfeingishjálp á Filipsoyggjunum. Felagsskapurin arbeiðir fyrst og fremst fyri at tryggja, at tey neyðstøddu fingu mat.

# Eftirlitsferð til Kambodia

Umboð fyri Uttanríkistænastuna var í tíðarskeiðinum 17. apríl – 4. mai 2012 á eftirlitsferð í Kambodja í sambandi við, at Føroyar lat stuðul til tvær verkætlanir í landinum. Trý ára heilsuverkætlanin "Making a difference" hjá Reyðakrossi var um at vera liðug, meðan fiskivinnuverkætlan hjá felagsskapinum Voluntary Service Overseas (VSO) var kort síðani byrjað.

Ferðina varð løgd soleiðis til rættis, at til bar at fylgjast við umboði frá føroyska Reyðakrossi, ið eisini skuldi vitja "Making a difference" verkætlanina. Harumframt fór Annika B. Hoydal út sum ráðgevi á fyri Reyða Kross Føroya fyri 3. ferð. Annika B. Hoydal er næstforkvinna í ráðgevandi nevndini fyri menningarsamstarv og játtaði í hesum sambandi at luttaka á vitjanunum hjá VSO, umboðandi ráðgevandi nevndina.




Vitjað varð í fýra økjum. Byrjað var í høvuðsstaðnum Phnom Penh. Síðani varð farið til verkætlanarøkið hjá VSO, sum liggur í Kratie í økinum kring Mekong ánna í landnyrðingspartinum av landinum. Harfrá varð farið til Rattanakiri landslutin heilt norðuri í landinum at vitja verkætlanina hjá Reyðakrossi. Ferðin endaði í útnyrðingspartinum av Kambodja- í Battambang, sum liggur í økinum kring Tonle Sap ánna, har VSO hevur eitt verkætlanarøki.

### Vitjanin hjá Voluntary Service Overseas (VSO)

Flogið varð til høvuðsstaðin í Kambodja, Phnom Penh, har steðgað varð í nakrar dagar. Her varð vitjað á høvuðsskrivstovuni hjá VSO í Kambodja. Samstarv við lokalar felagsskapir er grundleggjandi fyri

VSO, og roynt verður at menna hesar felagsskapir, so at teir gerast førir fyri at arbeiða virkið og munagott í egnum landi. Útgangsstøðið verður tikið í menningarátøkum, ið longu eru til. VSO roynir sostatt at arbeiða víðari við byrjaðum átøkum og tillaga/betra tey, heldur enn at byrja nakað nýtt.

Vitjað varð eisini á landsins fiskivinnuumsiting, har VSO hevur eitt starvsfólk, ið hjálpir kambodiansku stjórnini til við langtíðar planlegging. Viðkomandi virkar eisini sum bindilið millum landsins fiskivinnuumsiting og økini, ið liva av fiskiskapi.

Aftaná fundirnar í Phnom Penh varð farið til Kratie Province at vitja eitt verkætlanarøki hjá VSO. Vitjað var í bygdini Beoung Cha, í Sambo økinum, har høvið var at síggja umstøðurnar, hitta toymið og nøkur av teimum, ið fáa ágóðan av verkætlanini. Endamálið við verkætlanini er m.a. at geva bygdafólkinum betri inntøku úr fiskivinnu (í hesum førinum aling), so lívsumstøður teirra gerast betri. Ætlanin er ikki at seta nýggj tiltøk í verk, men at eftirkannað og betra verandi verkætlanir á staðnum. Í hesari tilgongd verður serliga hugt eftir hvat riggar og hvat ikki riggar fyri at finna haldgóðar loysnir.

Eitt húski, ið var partur av verkætlanini, bjóðaði inn á gólvið og høvið var at hitta bygdafólkið, ið myndaðu fiskivinnubólkin. Tey greiddu frá, at tey høvdu trupulleikar við at fáa nóg mikið av vatni í hyljarnar í turrtíðini. Tað er kostnaðarmikið at pumpa vatn úr Mekong ánni, so tað bar ikki til. Tey fingu tí ikki nýttu av hyljunum meira enn helvtina av árinum, og sum heild fingu tey ikki nóg stóra úrtøku av alingini. Endamálið við verkætlanini hjá VSO er at bøta um hesi viðurskifti. Verkætlan skal sum heild fremja eina røð av tiltøkum, ið skulu verja stovnarnar, samstundis sum meira fæst burturúr fiskiveiðini.

Vitjað var eisini tveir kambodianskar NGO felagsskapir, ið VSO samstarvar við. Tvey VSO starvsfólk starvast í felagsskapunum. Báðir felagsskapirnir tykjast arbeiða miðvíst við at skipa og menna sín felagsskap við góðum stuðli frá VSO. Sostatt er ein partur av menningarverætlanini hjá VSO at styrkja kambodianskan førleika innan menning, og hetta er eisini ein umráðandi partur av burðardyggari menningarhjálp.

Seinna verkætlanarøki hjá VSO er í Battambang, í útnyrðingspartinum av landinum. Byrjað var við einum kunnandi fundi hjá kambodjanska felagsskapinum A.S., ið VSO samstarvar við. Síðani varð farið til eitt øki, har bygdarsamfelagið, saman við VSO og lokalu samstarvspørtunum, hevur tikið

ábyrgdina av at gera eina burðardygga skipan, ið tryggjar ímóti ovfisking. Sambært bygdafólkinum er ólógligi fiskiskapurin í økinum minkaður niður í einki, og tey arbeiða nú saman um tryggja inntøku úr fiskivinnu. Hetta verður m.a. gjørt við at hava eitt friða økið, har nýggjur fiskur verður settur við.

Vitjað varð eisini eina lítla fyritøku, ið ein bólkur av kvinnum hevur stovnað við vegleiðing og stuðli frá VSO og A.S. Tær framleiða fiskapylsu, og hava fingið virðisløn fyri góða framleiðslu. At enda varð vitjað á einari fyritøku, ið framleiddi fiskasós og chilisós. Hendan fyritøkan var nú før fyri at klára seg uttan stuðul og var eitt dømi uppá eina sera væleydnaða verkætlan, har ein bólkur av bygdafólki høvdu byrja fyritøkuna við mennigarstuðuli og síðani høvdu miðvíst bygt fyritøkuna upp, og nú sjálvi kláraðu seg.

**Vitjan hjá Reyðakrossi**

Verkætlanin “Making a difference” hjá Reyðakrossi fer fram í Rattanakiri, heilt norðuri í landinum, inni í frumskógini. Verkætlanin fór av bakkastokki í 2009 og var liðug í juli 2012. Partur av avtaluni við Reyðakross Føroya inniber, at Reyðikrossur sendir eitt umboð úr Føroyum at luttaka í verkætlanini sum ráðgevi. Annika Hoydal, ljósmóður, hevur í hesum sambandi verið send út sum ráðgevi í 2009, 2010 og í 2012. Endamálið við verkætlanini er at betra um heilsustøðuna hjá upprunafólki í Rattanakiri-økinum. Talan er um arbeiði í sjey bygdum í Poy kommunu, har áleið 3.700 fólk búgva. Eitt av høvuðsendamálunum í verkætlanini er at geva bygdafólkinum atgongd til reint drekkivatn og at bøta um kloakkviðurskiftini í bygdunum.

Steðgað varð í økinum í fýra dagar, har vitjað varð á lokalu skrivstovuni hjá Reyðakrossi. Harumframt varð vitjað í fýra bygdum, har høvi var at hitta bygdarfólki og at síggja latrinur og vatnbrunnarnar.

Kunningarparturin er eisini týðandi. Bygdafólkið savnast regluliga saman í sonevndum “heilsuklubbum”, har ið tey fáa frálæru í m.a. reinføri og sjúkrafyribyrging. Sambært bygdafólkunum er lívið vorðið nógv lættari, nú tey hava atgongd til vatn nærhendis heiminum. Harumframt er útbreiðslan av diarré minkað munandi.


Á myndini sæst ein ný-gjørd latrina. Latrinan er í munandi betri standi enn húsini.

**Samanumtikið**

Vitjanin í Kambodia gav eitt neyvt innlit í verkætlanirnar, ið Føroyar hava stuðla, og viðurskifti kring verkætlanirnar og felagsskapirnar. Hetta er vitan, ið ikki fæst bert við at lesa frágreiðingar. Vitjanin gav eisini innlit í menningarsamstarvsøkið sum heild, tí nógvar verkætlanir eru skipaðar eftir sama leisti sum heilsuverkætlanin í Poy og fiskivinnuverkætlanin hjá VSO. "Community based involvement" eru lyklaorð innan menningarsamstarv og sipar til at tey, ið verkætlanin snýr seg um, eru við og eru virkin í verkætlanini. Hetta kann hava við sær, at verkætlanin gongur seinni enn ætlað, ella kanska sindur øðrvísi enn ætlað, men samanumtikið er tað avgerandi fyri um verkætlanin gerst væleydnað og burðardygg. Samanumtikið verður mett, at tað er sera umráðandi at fremja eftirlitsferðir, bæði fyri at tryggja, at peningurin verður nýttur sum avtalað, men eisini fyri at fáa betri innlit í viðurskiftini og umstøðurnar í teim londum og felagsskapum, ið vit samstarva við.

## Virksemi hjá ráðgevandi nevndini fyri altjóða menningarsamstarv

Til at útinna lógina um altjóða menningarsamstarv er sett ráðgevandi nevnd, sum arbeiðir eftir ásettari fyriskipan. Nevndin hevur formann og fýra limir, ið verða tilnevndir at sita í fýra ára skeið. Uppgávan hjá ráðgevandi nevndini er at veita landsstýrismanninum ráð um, hvussu lógin um altjóða menningarsamstarv skal fremjast í verki.

Í nevndini sita:

- Jens Helgi Toftum, formaður, ið starvast sum fulltrúi í Fiskimálaráðnum. Jens Helgi Toftum er útbúgvin fiskivinnufrøðingur og hevur drúgvar royndir innan altjóða samráðingar og nevndararbeiðið.
- Annika Hoydal, næstforkvinna, ið starvast sum ljósmóður á Landssjúkrahúsinum. Annika Hoydal hevur royndir innan altjóða menningarsamstarv úr Kambodia, har hon hevur virkað sum ráðgevi í heilsuverkætlan hjá Reyða Kross.
- Heri Kjærbo, ið starvast sum leiðari á boðanardeildini hjá Heimamissiónini. Heri Kjærbo hevur tikið hægri útbúgving í missiologi, og hevur átta ára royndir innan trúboðan og hjálpararbeiði í Tansania.
- Nicolina Lamhauge, MA í altjóða menningarsamstarvi, ið starvast sum búskaparfrøðingur og policy greinari hjá OECD í París. Hon hevur harumframt royndir úr felagsskapi í Bangladesj, ið veitir mikrolán.
- Bogi Eliasen, verkætlanarleiðari á FarGen, og útbúgvin samfelagsfrøðingur. Hann hevur starvast á táverandi Uttanríkisdeildini eitt tíðarskeið, har hann stóð fyri arbeiðinum at tilevna føroyskan menningarsamstarvspolitikk.

Bogi Eliasen avloysti Tommy Petersen við ársskiftið, ið legði frá sær í sambandi við, at hann fór í starv sum seniorráðgevi hjá Danida í Ramallah.

Nevndin hittist umleið fýra ferðir um árið. Skipað verður fyri árligum evnisdøgum, har nevndin viðgerð evni av týdningi. Harumframt eru serstakir fundir, har umsóknir um menningarsamstarv verða lagdar fyri nevndina til ummælis.

## Um samstarvspartarnar

**Christian Aid**

Felagsskapurin Christian Aid varð stovnaður sum eitt kirkjuligt samtak aftaná annan heimsbardaga fyri at hjálpa evropeiskum flóttafólkum, ið høvdu mist alt undir krígnum. Tað vóru bretskir og írskir kirkjuleiðarar, ið tóku stig til at stovna felagsskapin, sum byggir á kristnu trúnna, men sum virkar fyri øll uttan mun til átrúnað. Felagsskapurin virkar í dag í 50 ymiskum londum.
www.christianaid.org/uk

**Mercy Corps**

Mercy Corps er ein hjálparfelagsskapur, ið byrjaði sítt virki í 1979 undir heitinum *"Save the Refugees Fund"* við tí endamáli at veita flóttafólki í Kambodja neyðhjálp. Í 1982 skifti felagsskapurin navn til Mercy Corps og fór við hesum at arbeiða meira langskygt við tí endamáli at basa fátækdømi og hungursneyð. Høvuðsendamálið hjá felagsskapinum er at berja niður líðing, fátækdømi og kúgan við at hjálpa fólki at byggja trygg, framleiðandi og rættvís samfeløg. Felagsskapurin hevur høvuðssæti í USA og arbeiðir í 40 londum.
www.mercycorps.org

**New Life Africa International (NLAI)**

NLAI er ein felagsskapur, sum virkar í býnum Nakuru í Kenja, har felagsskapurin rekur ein skúla og barnaheim fyri foreldraleysum børnum. Talan er upprunaliga um eitt privat tiltak, við donsku hjúnunum Susanne og Leif Madsen á odda, ið komu til Kenja sum trúboðarar. Felagsskapurin hevur 15 ár á baki. Fleiri føroyingar eru knýttir at felagsskapinum, og hava gjørt sjálvboðið arbeið á skúlanum og á barnaheiminum. www.newlife-africa.org/

**Plan**

Plan er ein altjóða hjálparfelagsskapur, ið arbeiðir við at hjálpa fátøkum børnum úti í heimi til eitt betur lív. Felagsskapurin, ið hevur 70 ár á baki, leggur serligan dent á at tryggja børnum rættin til heilsu, harímillum atgongd til reint vatn, rættin til útbúgving og medávirkan.

Plan arbeiðir í 50 londum og hevur høvuðssæti í Onglandi. www.plan-uk.org/

**Reyði Krossur**

Reyði Krossur í Føroyum varð stovnaður í 1926 við tí endamálið at veita hjálp til teirra, ið hava hjálp fyri neyðini, bæði í Føroyum og úti í heimi. Reyði Krossur í Føroyum er limur í altjóða Reyða Krossi umvegis Dansk Røde Kors. Altjóða Reyði Krossur er ein heimsumfatandi felagsskapur við deildum í 186 londum. Felagsskapurin er serliga kendur fyri sín leiklut í sambandi við náttúruvanlukkur og í krígsstøðu, har ið Reyði Krossur hevur lógarásettan rætt at vitja fongsul.

www.redcross.fo www.icrc.org

**Voluntary Services Overseas (VSO)**

VSO er ein altjóða felagsskapur við meira enn 50 ára royndir á baki, ið arbeiðir við menningarsamstarvi til tess at basa fátækdømi í menningarlondum. Málið hjá VSO er at føra fólk saman og deila kunnleika, uppbyggja nýggja vitan, arbeiða fyri altjóða tilvitan og virksemi, og at broyta lívsumstøður, til tess at heimurin gerst eitt rættvísari stað fyri øll. Dentur hevur seinnu árini verðið lagdur á útbúgving (við serligum atliti at kvinnum og gentum), HIV og AIDS, heilsa, at hjálpa fólki at vinna sær til gerandisdagin (secure livelihoods), styrkja luttøka og stýring/leiðsla og rættindini hjá fólk, ið bera brek.

Felagsskapurin er skrásettur í Onglandi og hevur virksemi í meira enn 40 londum. www.vso.org.uk

**World Food Programme (WFP)**

WFP er heimsmatvørufelagsskapurin undir Sameindu tjóðum, ið varð settur á stovn í 1963. Endamálið er at basa hungursneyð kring heimin og at veita skjóta og munagóða hjálp í sambandi við kreppur og vanlukkur. WFP arbeiðir somuleiðis við langtíðar málum at bøta um matvørutrygdina í teimum londum, har ið felagsskapurin arbeiðir.

www.wfp.org

# Fíggjarnýtsla 2012

## Menningarsamstarv

| Verkætlan | Land | Upphædd |
|---|---|---|
| VSO | Nepal | 264.004 kr. |
| VSO | Kambodia | 132.872 kr. |
| LSH | Paksitan | 125.000 kr. |
| NLAI | Kenja | 400.000 kr. |
| Plan UK | Sambia | 425.000 kr. |
| Plan UK | Senegal | 458.000 kr. |
| Mercy Corps | Eysturtimor | 180.500 kr. |
| **Tilsamans** | | **1.985.376 kr.** |

## Neyðhjálp

| Verkætlan | Land | Upphædd |
|---|---|---|
| Reyði Krossur | *Sýria* | 200.000 kr. |
| Reyði Krossur | *Vesturafrika* | 100.000 kr. |
| WFP | *Filipsoyggjar* | 200.000 kr. |
| **Tilsamans** | | **500.000 kr.** |

# Listi yvir menningarlond sambært OECD

## DAC List of ODA Recipients

## Effective for reporting on 2011, 2012 and 2013 flows

| Least Developed Countries | Other Low Income Countries (per capita GNI <= $1 005 in 2010) | Lower Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $1 006-$3 975 in 2010) | Upper Middle Income Countries and Territories (per capita GNI $3 976-$12 275 in 2010) |
|---|---|---|---|
| Afghanistan | Kenya | Armenia | Albania |
| Angola | Korea, Dem. Rep. | Belize | Algeria |
| Bangladesh | Kyrgyz Rep. | Bolivia | *Anguilla |
| Benin | South Sudan | Cameroon | Antigua and Barbuda |
| Bhutan | Tajikistan | Cape Verde | Argentina |
| Burkina Faso | Zimbabwe | Congo, Rep. | Azerbaijan |
| Burundi | | Côte d'Ivoire | Belarus |
| Cambodia | | Egypt | Bosnia and Herzegovina |
| Central African Rep. | | El Salvador | Botswana |
| Chad | | Fiji | Brazil |
| Comoros | | Georgia | Chile |
| Congo, Dem. Rep. | | Ghana | China |
| Djibouti | | Guatemala | Colombia |
| Equatorial Guinea | | Guyana | Cook Islands |
| Eritrea | | Honduras | Costa Rica |
| Ethiopia | | India | Cuba |
| Gambia | | Indonesia | Dominica |
| Guinea | | Iraq | Dominican Republic |
| Guinea-Bissau | | Kosovo[1] | Ecuador |
| Haiti | | Marshall Islands | Former Yugoslav Republic of Macedonia |
| Kiribati | | Micronesia, Federated States | Gabon |
| Laos | | Moldova | Grenada |
| Lesotho | | Mongolia | Iran |
| Liberia | | Morocco | Jamaica |
| Madagascar | | Nicaragua | Jordan |
| Malawi | | Nigeria | Kazakhstan |
| Mali | | Pakistan | Lebanon |
| Mauritania | | Papua New Guinea | Libya |
| Mozambique | | Paraguay | Malaysia |
| Myanmar | | Philippines | Maldives |
| Nepal | | Sri Lanka | Mauritius |
| Niger | | Swaziland | Mexico |
| Rwanda | | Syria | Montenegro |
| Samoa | | *Tokelau | *Montserrat |
| São Tomé and Príncipe | | Tonga | Namibia |
| Senegal | | Turkmenistan | Nauru |
| Sierra Leone | | Ukraine | Niue |
| Solomon Islands | | Uzbekistan | Palau |
| Somalia | | Vietnam | Panama |
| Sudan | | West Bank and Gaza Strip | Peru |
| Tanzania | | | Serbia |
| Timor-Leste | | | Seychelles |
| Togo | | | South Africa |
| Tuvalu | | | *St. Helena |
| Uganda | | | St. Kitts-Nevis |
| Vanuatu | | | St. Lucia |
| Yemen | | | St. Vincent and Grenadines |
| Zambia | | | Suriname |
| | | | Thailand |
| | | | Tunisia |
| | | | Turkey |
| | | | Uruguay |
| | | | Venezuela |
| | | | *Wallis and Futuna |

*Territory.

(1) This is without prejudice to the status of Kosovo under international law.